J. H. Danbjørg 60 ár

Fríggjadagin 9. november varð J. H. Danbjørg, lærari í Porkeri, 60 ár. Um Danbjørgs lívssøgu er so nógv at siga, og kann tað vera vert at nema við nakað av tí, íð honum er viðfarist, nú hann fyllir síni seksti.

Tað skal við tað fyrsta sigast, at at Danbjørg er sonur til hin tiltikna Daniel Danielsen, ella kanska best kendur sum Dánjal í Ungagarði; hann (Dánjal) var lærari í Porkeri og Hovi, og lærdi hann eisini skiparar, og er tað mangur góður kendur skipari, ið hevur fingið sín kunnleika undir hansara hond í Porkeri; men tíverri doyði hann heilt ungur burtur, bert 44 ára gamal, meðan børnini vóru heilt smá. J. H. Danbjørg misti soleiðis pápan, tá hann var 7 ára gamal. Tessvegna føddist sosialisman í hansara barnasál; tí hann fekk tíðliga at síggja, hvat tað vildi siga at vera faðirleysur.

Danbjørg tók læraraprógv í 1917, berrt 20 ára gamal, og sama árið byrjaði hann sum lærari í Sumbiar sókn og síðan í Eysturoy í Nes sókn inntil hann í 1920 tók við lærarastarvinum í føðibygd síni, har hann kom at halda skúla saman við móður síni, sum røktaði annað læraraembæti. Slíkt man vera ógvuliga sjáldsamt, at móðir og sonur hava hildið skúla saman.

1924-25 var hann næmingur á Askov háskúla í Danmørk. Í 1925 tók hann við sum formaður fyri Porkeris sókn og var formaður í 10 ár; og kom tá tíverri sjúka at níva heim hansara, og førdi hon tað við sær, at hann misti fyrru konu sína, einans 28 ára gomul, og bað hann sær frá sum formaður, men var tó sóknarstýrislimur mong ár aftaná.

Meðan Danbjørg var formaður, varð ymist gjørt, sum til dømis ein lendingarbrúgv, ið tá var tørvur á, við tað at mangir stórír installeringar vóru komnir til bygdina. Eisini varð akvegur úr Vági og til Hovs gjørdur í hansara formannstíð. Í 1936 kom hann á fyrsta sinni inn á Føroya løgting, og var í trý ár løgtingsformaður og seinni skrivari løgtingsins í fýra ár. Í 1947 var hann eisini kosin at vera formaður Suðuroya Fiskimannafelags, og hevur hann sum tann ídni og holli slitmannatænari, hann hevur verið, røktað hetta ábyrgdarstarv eins og øll onnur, ið honum hava verið latin upp í hendur, við miklum ídni og trúfesti, inntil sjúkan nakað síðan kom at níva hann so illa, at hann mátti biðja seg undan sum formaður fyri S. F.

Tað er ikki bert orð, ið siga tað, at Danbjørg er høgt virdur millum manna, men øll hesi álitisstørv, hann hevur havt um hendur at røkja fyri almenningin prógva tað til fullnar, umframt nógv onnur størv, ið ikki tykist vera neyðugt at siga frá her. Ikki at undrast yvir, at J. H. Danbjørg nú situr sjúkur og niðurbrotin av nervum og øðrum tílíkum sjúkum, orsakað av øllum teim størvum hann hevur havt um hendur at baksast við fyri at tæna teirri fátæku fjøldini sum best.

At Danbjørg ikki hevur spart seg, síðan hann fekk høvi at verða tænari fólksins, er besta prógvið tað, at hann nú, bert seksti ára gamal, situr nervasprongdur, og soleiðis avskorin frá at gera tað góða, ið hugur hansara tráar eftir — at hjálpa teirri fátæku fjøldini, ið livur á lívsins skuggasiðu. Tað er eitt orð, ið sigur: »Ein profetur er ikki í miklum virði í síni føðibygd«. Hesi orð hóska ikki væl til Danbjørg, tí fáur man vera meira virdur enn Danbjørg í síni føðibygd, Porkeri. Besta prógvið um tað, eru øll tey mongu ár, hann varð valdur sum sóknarstýrisformaður, og ikki minni virðing og álit hava hansara bygdamenn víst honum við hvørt løgtingsval — teir hava víst honum ein slíkan heiður — at hann var kletturin, ið teir við fullum treysti kundu rista kross fyri annaðhvørt tað so var til sóknarstýrisval ella til løgtingsval, tí ongan heitari talsmann áttu teir at verja teirra áhugamál, enn fátækara vinin, Danbjørg.

Um Danbjørg er ikki bert tað at siga, at hann er heithjartaður, nærlagdur, vinsælur og viljasterkur; men hann er eisini sera vitugur og bjartskygdur í øllum ti, hann hevur handfarið gjøgnum tíðina. Hr. Danbjørg er ikki bert væl umtóktur heima í Porkeri, men víða hvar hann er kendur. Sum áður nevnt, hevur ein slík sjúka herjað Danbjørg seinastu tíðina, at hann hevur verið avskorin frá luttøku í almennum arbeiði og fekk hann soleiðis ikki høvi til at luttaka í næstseinastu løgtingssetu, og kendu hansara partamenn miklan sakn í honum, tí í tí politiska flokksarbeiðinum á tingi høvdu teir í honum átt ein dyggan stuðul. Ja, hetta kann eg loyva mær at frambera, tí sjálvur Dam segði yvir fyri mær, at ein slíkur maður sum Danbjørg var saknur í á tingi, tí hann hevði so sjáldsamar gávur til at handfara tey ymisku málini. Danbjørg verður ikki bert saknaður millum sínar staldbrøður á tingi; men allastaðni, har hann leggur frá sær — har hansara sessur kemur at standa tómur, og verður eisini ringt at fáa mann at sessast aftur í sessi hansara.

Danbjørg hevur verið eldhugaður javnaðarmaður, líka frá ungum árum, og lagt alla sína orku til land og fólk, eins og hann hevur verið javnaðarflokkinum og blað tess ein hin dyggasti stuðul. Tær greinir, hann hevur skrivað, eru ikki fáar í tali, og ikki hava tær heldur verið innihaldsleysar, men væl undirbygdar frá byrjan til enda við tí rætta innihaldinum, ið sømir einum sosialistiskum slóðara. Ikki minst innan fyri blað okkara er hansara tvíeggjaði pennur saknaður nógv, og vit eru nógv, ið ynskja og vóna at hann aftur má fáa heilsuna til at virka millum okkum við teim góðu gávum, hann frá sínum skapara hevur fingið.

Eg kann tí við vissu siga, at tað eru mong, ið fara at frambera honum bestu heilsur og kvøður á hansara seksti ára degi, og sæla lukku fyri tíðina frameftir.

Gævið landið hevði havt fostrað fleiri slíkar synir.

Til lukku við teimum seksti.

D. J. Sørensen.

Burturluting háskúlans.

Við burturlutingina til frama fyri Føroya Fólkaháskúla hava hesi nummør vunnið:

Nr.	Bólkur A:
3807	eitt fýramannafar
3788	ein grindareiðskap
3206	eitt lamb úr Kvívík
	Bólkur B:
1569	ein borðabát
501	eitt kaffistell
736	seks silvurkaffiskeiðir
4016	ein broderaðan kaffidúk
614	eitt lamb úr Hattarvík
1620	eitt sleppingarlamb úr Svínoy
535	eitt lamb av Velbastað
	Bólkur C:
4373	eitt fototól
3643	ein valorovn
3102	eitt dupult stálvask
1001	ein ferðaseðil við »Tjaldri« (innanoyggja)
1490	eitt tons av enskum koli
1750	eitt sleppingarlamb úr Svínoy
4884	eitt sleppingarlamb úr Botni í Funningi
	Bólkur D:
2146	ein pol. grindareiðskapur
2106	eitt barometur
3542	ein ferðaseðil við »Tjaldri« (innanoyggja)
1855	ein dupult kókipláta
3354	eitt sleppingarlamb úr Funningslíð
2596	eitt lamb úr Vestmanna
2540	eitt lamb úr Kollafirði
	Bólkur E:
4322	ein plátuspælari
4261	ein divan
2807	ein mynd úr Klakksvík
3270	ein klædningur nr. 52
394	ein dúkur
326	ein mynst. troyggja t. før. búna
275	eitt lamb úr Gásadali
4089	eitt lamb úr Bø

Lutirnir fáast við at venda sær til háskúlan áðrenn hálvan desember.

Slakar 50.000 kr. komu inn við basarin fyri háskúlan.

Eisenhower kosin

Eisenhower varð afturvaldur til president fyri U.S.A. Í kongressini hendi eingin broyting: har situr republikanski flokkurin framvegis í minnitali.

Landsretssagfører

B. Husted-Andersen

Kontor:
»Richshuset«, Raadhuspladsen, 16 II
København V.
Tlgr.-adr: Austroko - Tlf. Mi 788 & 3770

ey Gjað

Einaferð var herróp fólkaflokksmanna: »Endamál okkara er at reka sambandið burtur úr øllum álitissessum her á landi«.

— — —

Um hjúnarbandið millum sambandið og fólkaflokkin segði harra Bláhamar á sinni: »Gævi at tað aldri slitnaði aftur.«

— — —

Og so var tað danski háskúlastjórin Bjerre, sum í danska útvarpinum nevndi tjóðveldisflokkin fyri »det socialistiske løsrivelsesparti«. — Ein løgin sosialistiskur flokkur, tá ein hugsar um bardaga teirra fyri at fáa Landshandilin, fólksins egna handil, avtiknan.

SOSIALURIN Viðmerkingar

Nú nýggi skúlin í Havn er tikin í brúk, verður ætlandi stigið til at fáa í lag skúlakøk tikið fult og heilt. Hetta hevur sjálvsagt alstóran týdning fyri tær ungu genturnar, ið búgva seg skulu til góðar hús- og matmøður; men ein eigur ikki at gloyma dreingirnar. Eisini teir mugu hava høvi til at fáa sín lærdóm og sína nyttu av skúlakøkinum. Eisini hjá teimum er ofta neyðugt og nyttugt at hava eina hylling á matgerð — ikki minst hjá teimum, ið skulu umborð í skipini sum kokkar. Lat okkum tí gera tað til fasta reglu, at so við og við, sum skúlar okkara fáa skúlakøk, skulu eisini dreingirnir koma at njóta gott av hesi lærugrein. Tað vil verða heimunum og okkara sjómonnum til almikið gagn.

Røntgen

Innsavnan kvinnufelagsins til røntgentól endaði mánadagin. Blaðið hevur fingið sendandi frá J. M, 20 kr., P. 10 kr. og SMMS 20 kr. Við teimum áður innkomnu 81 kr. eru nú tilsamans innkomnar 131 kr., ið sendar eru kassameistara kvinnufelagsins.

Lønjavningargrunnur Skipsfiskimanna

viðbót fyri 1956.

Umsóknarblað til lønjavningar verða flýggjað út hjá sýslumonnunum (í Mykinesi og Skúvoy hjá kommunustýrinum) og á skrivstovuni í Tórshavn (telf. 2143).

Tað verður minnt á, at umsóknirnar eiga at vera innkomnar áðrenn **1. mars 1957** og avrokningarnar fyri 1956 eiga at fylgja við.

Halda menn seg eiga viðbót og hava ikki fingið avrokningar, **eiga teir kortini at senda umsóknina inn áðrenn 1. mars** og senda avrokningarnar tá teir fáa tær og ikki seinni enn 1. januar 1958, tí annars fella umsóknirnar burtur eftir 3. § í reglugerðini.

Umsóknir ið koma aftaná 1. mars 1957 verða ikki viðgjørdar.

NEVNDIN